# Stórt kjak um PISA í Norðurlandahúsinum

**Klingran í Norðurlandahúsinum var á tremur, tá almenna orðaskiftið, ið vardi samfullar tríggjar tímar, um PISA-undankanningina var á skránni í gjárkvøldið.**

PISA
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*



*Kappingar-elementið skal inn aftur í skúlarnar, og ein eftirmeting av øllum lærarunum og næmingunum eigur at verða gjørd javnan. Vit eiga at skipa fyri eini betri og sterkari leiðslu í skúlunum. Tað er ongantíð mennandi at hava eina monopolleiðslu, sum vit at kalla hava nú í føroysku skúlunum. Kanska tað hevði verið gott at fingið skúlastjórar fyri eitt ávíst áramál? Enn síggi eg bøkur í fólkaskúlanun, sum eg brúkti, tá eg gekk í skúla. Tað er kanska nostalgiskt, men hevði helst ikki viljað sæð tær. "Læraraútbúgvingin átti at verið eftirkannað og møguliga gjørd til eina hægri útbúgving."*

Alt fyri eitt sást, at sera stórur áhugi var fyri almenna orðaskiftinum um PISA-undankanningina, ið Fólkafloksungdómar skipaðu fyri í Norðurlandahúsinum í gjárkvøldið.

Uttan fyri Norðurlandahúsið var ikki ein tómur parkeringsbásur at síggja, og inni í Klingruni vóru alt ov fá sitipláss til stóru áhoyrarafjøldina. Millum mongu áhoyrarارnar sótu sera nógvir lærarar, men eisini politikarar, foreldur, næmingar og onnur, ið hava tilknýti til føroyska skúlan.

Orðaskiftið var skipað soleiðis, at fyrst slapp eitt panel at siga sína hugsan um PISA-kanningina. Í panelinum sótu Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, Magnus Tausen, formaður í Føroya Lærarafelag, Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, og Pól Jespersen, lærari í Hoydølum. Somuleiðis sótu tríggjar mammur at børnum, sum hava gingið í skúla uttan fyri Føroyar og í Føroyum, í panelinum og greiddu frá muninum millum føroyska skúlan og skúlar aðrastaðni. Mammurnar vóru Elin Winther Poulsen, Dorit Hansen og Durita Dam Jacobsen. Síðan varð lagt upp til kjak, har mongu áhoyrararnir høvdu høvi at seta panelinum spurningar.

– Tráðleysa mikrofonin gekk heit millum áhoyrararnar, og spurningarnir vóru mangir! Orðaskiftið vardi í tríggjar tímar, og hóast tað til tíðir var heldur óruddiligt, kom nógv gott fram, - so avgjørt ein góð byrjan til eina viðgerð av PISA-kanningini.

Landsstýrismaðurin, Jógvan á Lakjuni, fegnaðist um stóra áhugan fyri tiltakinum, men hevði eingi ítøkilig boð um, hvat kann gerast:

- Tað er stuttligt at síggja, at so nógv eru savnað saman í Norðurlandahúsinum at lurta eftir orðaskiftinum.Eg fegnist um orðaskiftið og lurti væl eftir. Vit noyðast at stramma upp á øllum økjum, segði landsstýrismaðurin.

---

Sp/f Skousen Húsarhald:

# Nýggjur hvítvøruhandil á Hálsi

**Hósdagin 18. mai letur ein nýggjur handil upp á Staravegi 5 á Hálsi í Havn. Talan er um hvítvøruhandilin Sp/f Skousen Húsarhald, sum Rói Ørvarodd eigur og rekur. Handilin er við í donsku hvítvøru handilsketuni Skousen Husholdningsmaskiner A/S**

HANDIL
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Sp/f Skousen Húsarhald er nýggjasti handilin innan hvítvørur, køkar og húsarhaldstól. Handilin letur upp hósdagin kl. 8.00 við nógvum góðum tilboðum, sigur Rói Ørvarodd, stjóri í handlinum.

Skousen Húsarhald er við í donsku hvítvøru handilsketuni Skousen Husholdningsmaskiner A/S og hava sama vøruúrval.

Hvítvørurnar eru av flest øllum merkjum sum t. d. Miéle, Elektrolux, Blomberg og Atlas. Skousen hava einaumboð uppá Atlas hvítvørur.

Umfram hvítvørurnar hevur handilin eisini stórt úrval av smáum húsarhaldsvørum sum t.d. rakimaskinum, trimmarum og kaffimaskinum.

Eisini verður ein deild við BIGA-køkum.

Rói sigur, at hann valdi at fara í samstarv við Skousen Husholdningsmaskiner, tí tað er ein stór handilsketa við nógvum kendum merkjum og stórum vøruúrvali, alt til kappingarførar prísir.

Vit koma at leggja dent á stórt vøruúrval og kappingarførar prísir saman við góðari tænastu, sigur Rói Ørvarodd.

Rói Ørvarodd er 29 ára gamal og útbúgvin krambarkallur. Hann lærdi hjá Bónus-handlunum, har hann 12 tey seinastu árini hevur arbeitt sølumaður og sum handilsleiðari.

Skousen Husholdningsmaskiner A/S varð stovnað í Vojens í 1957 av Preben Skousen. Fyritøkan er framvegis í somu familju, og stjóri í dag er sonurin, Erik Skousen.

Skousen Husholdningsmaskiner hevur í dag 65 handlar í Danmark við tilsamans 340 starvsfólkum. Fyritøkan bleiv í 2005, sum ein av teimum fyrstu í Danmark, sertificerað av DFF (Dansk Franchise Forening).



*Bjørg Lamhauge, sølufólk, og Rói Ørvarodd, stjóri í nýggja handilinum Skousen Húsarhald, sum letur upp hósdagin kl. 8.00*
*Mynd: Jens Kristian Vang*